# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## TØKK

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra móðir, dóttir, systir, vermamma, omma og fastir okkara:

**Carol Ingelise Petersen**
Froðba



brádliga varð tikin frá okkum og varð jarðað. Tøkk til prest fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til kirkjutænarar og sangarar. Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum, og til tykkum, ið lótu blómur, kransar og ymsar gávur.

***Familjunnar vegna***

**Dánjal, Bjarki, Roald og Arvid**

†

## ANDLÁT

Við hesum verður sagt frá at okkara kæri beiggi og sonur,

**Sune Klett**

føddur tann 3. november 1965 í Rødovre, er deyður tann 25. apríl 2010 í Rødovre 44 ára gamal.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

***Anna Kathrina og Hjørgrímur Klett og Anna Elisabeth við familju***

# Reinholdi Nielsen til minnis

Havi júst verið í Føroyum og merkt tóma plássið eftir kæra vin okkara Reinhold, sum alt ov tíðliga er tikin frá okkum.

Vit komu at kenna Reinhold betur ta síðstu tíðina, hann var í Danmark. Hann plagdi at koyra til eitt røktarheim, har systir hansara lá. Arne plagdi onkuntíð at fara við honum, og tá ið Reinhold flutti heim til Føroyar, plagdu vit at vitja systur hansara, sum eisini varð tikin alt ov tíðliga burtur.

Tað fyrsta, Reinhold segði, fyrstu ferð hann kom á gátt hjá okkum í Greve, vóru orðini, sum standa í

Sálma 32,8: "Eg skal læra teg, og vísa tær vegin, ið tú skalt ganga, Eg skal leggja tær ráð við at hyggja á teg." Sálmur eftir kong Dávid, mannin eftir Guds hjarta.

Reinhold var sera evnaligur, ein góð gáva, sum hann kundi nýta gott av, eisini í dagliga yrki hansara. Ikki var neyðugt hjá Reinholdi at fara undir hægri útbúgving, tí eingin lærustovnur kann læra ein, tað sum er viðføtt.

Nú á døgum er ikki nóg mikið at vera væl lærdur maður, nei, nú er orðið "Master" – Master grade, vunnið meira og meira inn í teir hægru lærustovnarnar.

Sum arbeiðstakari í Danmark sat Reinhold millum væl lærdar menn, sum undraðust, at Reinhold ikki hevði eina hægri útbúgving.

Tann sami Gud, sum valdi hirðadrongin Dávid til kong í Ísrael, var



lærumeistarin sum Reinhold setti sítt álit á.

Reinhold hevði sum fáur, andaligan vísdóm. Okkum dámdi væl at lurta eftir honum.Tá ið vit lurtaðu eftir Reinholdi, komu orðini: "at sita við føtur Gamiels", okkum í huga.

Í Apostlasøguni 5. kapitul, ørindi 34:stendur, hvør hesin Gamaliel var: "Men tá reistist í ráðnum Fariseari, ið æt Gamaliel, lóglærari, sum var nógv umhildin av øllum fólkinum.." Paulus sigur í verjurøðu síni í Apostlasøguni 22. kapitul, 3. ørindi: har hann sigur fólkinum, hvør hann er:

Eg eri jøði, føddur í Tarsus, í Kilikia, men uppvaksin á hesum staði, upplærdur vit føtur Gamaliels.

Reinhold harafturímóti var ikki lóglærari, nei, hann hevði møtt frælsi Kristusar. Galatiabrævið 5. kapitul, 1. ørindi: "Til frælsi hevur Kristus gjørt okkum fríar. Standið tí fastir og latið tykkum ikki aftur leggja undir trældómsok".

Tað er hetta eftirmæli, vit fegin vilja seta yvir kæra vin okkara Reinhold.

Góða Anna, tað frøddi meg at síggja, hvussu birg tú ert, og eg má ásanna, at enn einaferð komu orðini, ið standa í Orðtøkunum 31 mær í huga: í ørindi 10: " Dugnaliga konu – hvør finnur hana? Mangan meir enn perlur er hon verd..." Tað var eisini gott at hoyra, at tit halda fram við tí virki, sum Reinhold setti á stovn.

Góði Jón og góða Charlotta, sum tit halda fram á lívsleið tykkara, so kunnu vit ikki geva tykkum nakað betur, enn tað, sum pápi tykkara hevði sum mál á lívsleið síni, og tað er aftur:

Sálmur 32,8: "Eg skal læra teg og vísa tær vegin, ið tú skalt ganga, Eg skal leggja tær ráð, við at hyggja á teg".

Tað kundi - nýta vit menniskjaligan málistokk - sæð út, sum at í Salem er stólurin tómur,og røddin tagnað, men aftur her er troyst og lív at finna í Guðs orði: Sálmur 68,6: Faðir faðirleysra og verji einkanna er Gud í heilaga bústaði Sínum.

Má Guds signing og Guds friður hvíla yvir tykkum góða Anna, Jón og Charlotta og yvir tykkara kæru børnum og ætt tykkara, og yvir øllum tykkum, sum sita við sakni eftir Reinhold.

**Greve á summarmáladegi 2010**
**Ása og Arne Hansen**

# Merkisdagar

### 65 ára føðingardagur

Sunnudagin 2. mai verður Peter Ove Eliasen, Klaksvík 65 ár. Dagurin verður hildin Undir Brúnni 1.

### 75 ára føðingardagur

Mikudagin 28. apríl fyllir Alma Bjartalíð, Klaksvík 75 ár. Hon verður væntandi stødd í Keypmannahavn í samband við at ommudóttirin, Tóra Brend, verður konfirmerað tann 30/4. Heilsan kann sendast við t-post til almabjartalid@hotmail.com ella sms/tlf. 0045 6042 8031.

### 80 ára føðingardagur

Mikudagin 28. apríl fyllir Victoria Tróndheim Leirvík 80 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum leygardagin 1. mai frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur

Tann 30. apríl fyllir Sigvald Kristiansen, fyrrverandi kommunulækni á Skála, 80 ár. Dagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum á Skála, og byrjar borðhaldið kl. 17. Øll eru vælkomin.

### Silvurbrúdleyp

27. apríl hava Solveig og Danjá Petur Müller, Kvívík, silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

### Brúdleyp

Leygardagin 1. mai giftast Linda Kjeld, Tórshavn og Jákup Eli Joensen, Oyrabakki. Vígslan verður kl. 12 í Havnar Kirkju. Døgurðin verður saman við familjuni. Síðan verður veistlan í Bygdarhúsinum í Kollafirði kl. 19, og familja og vinir eru vælkomin.

Leygardagin 1. mai giftast May-Britt Jacobsen og Henning Holm, Vágur. Vígslan verður í Vágs kirkju kl. 15. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í VB húsinum kl. 18.30.

Leygardagin 1. mai kl. 11 giftast Elma á Geilini, Svínoy, og Andras Ortind, Sørvágur, í Samuelskirkjuni, Keypmannahavn. Opið hús verður í Absalonsgade 23, København V, kl. 20 har øll ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið eru vælkomin.

Leygardagin 1. mai giftast Dania Berthelsen og Svein Thomsen, Strendur. Vígslan verður í Sjóvar kirkju kl. 11. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 15. Frá kl. 19 verður opið hús í Bygdahúsinum á Strondum, har øll er hjartaliga vælkomin at gleðast saman við brúðarparinum. Vinarliga Dania & Svein.

Leygardagin 8. mai giftast Fríða Ellingsgaard og Eyðfinnur Bjarnason Joensen, Eiði. Vígslan verður í Eiðis kirkju kl. 9. Brúdleypið verður á Hotel Føroyum kl. 11 fyri innbodnum.

Leygardagin 15. mai giftast Súsanna Debes og Herleif Hammer, bæði úr Havn. Vígslan verður í Hoyvíkar kirkju kl. 15. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið eru hjartaliga vælkomin í opið hús heima í Huginsgøtu 1, Hoyvík, frá kl. 18. Vinaliga sigið frá á tel. 509003 ella á mail herleif.hammer@skulin.fo innan 3. mei.